**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi:**

*Hesir roknskapir fyri roknskaparárið 2000, eru innkomnir eftir seinasta innlatingardag 1. august 2001, men áðrenn 3. oktober 2001.*

| | | |
|---|---|---|
| 06.02.97 | 100 Tórshavn | Sp/f 2630 |
| 1. September 1998 | 100 Tórshavn | Sp/f 2787 |
| 19.10.1995 | 490 Strendur | Sp/f 2491 |
| 22.12.94 | 100 Tórshavn | Sp/f 2424 |
| 25. Oktober 1999 | 100 Tórshavn | Sp/f 2927 |
| 25.08.2000 | 100 Tórshavn | Sp/f 2072 |
| 6.september 2001 | 100 Tórshavn | Sp/f 1090 |
| 6/6-1997 | 100 Tórshavn | Sp/f 1792 |
| 7. September 2000 | 477 Funningsfjørður | Sp/f 3073 |
| Á Høgabóli | 370 Miðvágur | Sp/f 492 |
| A.D.J. | 600 Saltangará | Sp/f 2480 |
| AB-Grannskoðan | 100 Tórshavn | Sp/f 1466 |
| Alfa Seafood | 530 Fuglafjørður | Sp/f 2548 |
| All-Inter | 700 Klaksvík | Sp/f 2398 |
| Alting | 100 Tórshavn | Sp/f 2180 |
| Anders Andersen | 490 Strendur | Sp/f 1267 |
| Andersens Beding | 490 Strendur | Sp/f 2416 |
| Arabo Consultants | 415 Oyraeingir | Sp/f 3060 |
| Arksam | | |
| Arkitektavirkið MAA | 100 Tórshavn | Sp/f 1891 |
| Arrow Føroyar | 100 Tórshavn | Sp/f 2774 |
| Atlantic Wool | 512 Norðragøta | Sp/f 2459 |
| Auto Vulk | 900 Vágur | Sp/f 2708 |
| Autotrans | 360 Sandavágur | Sp/f 2539 |
| Avrit | 100 Tórshavn | Sp/f 1148 |
| Awi Báta Sentur | 650 Toftir | Sp/f 2563 |
| Awi Boats Service | 620 Runavík | Sp/f 2397 |
| Berg | 530 Fuglafjørður | P/F 759 |
| BHS-Total | 850 Hvalba | Sp/f 2615 |
| Bilasølan | 100 Tórshavn | P/F 2292 |
| Bilstøðin Auto | 210 Sandur | Sp/f 2179 |
| Bókabúðin | 600 Saltangará | Sp/f 489 |
| Borgarin | 700 Klaksvík | Sp/f 2297 |
| Borgin | 700 Klaksvík | Sp/f 2611 |
| Brandur | 530 Fuglafjørður | Sp/f 733 |
| Breyðmolin | 530 Fuglafjørður | Sp/f 2483 |
| Bryggjan | 350 Vestmanna | Sp/f 3014 |
| Búgv | 100 Tórshavn | Sp/f 271 |
| Byggitænastan | 800 Tvøroyri | Sp/f 1947 |
| Byggivirkið H.H. | 480 Skáli | Sp/f 2607 |
| C.A.L. | 660 Søldafjørður | Sp/f 680 |
| CN-Bygg | 900 Vágur | Sp/f 2644 |
| Columbus | 600 Saltangará | Sp/f 146 |
| Contrive Jsp Ltd. | 700 Klaksvík | Sp/f 2546 |
| D.J. Enni | 800 Tvøroyri | Sp/f 1872 |
| Dagkeyp | 513 Syðrugøta | Sp/f 2690 |
| Delta Seafood | 800 Tvøroyri | P/F 2468 |
| Djúphav | 370 Miðvágur | Sp/f 2806 |
| Dygd | 100 Tórshavn | P/F 113 |
| Eclipse | 100 Tórshavn | Sp/f 3022 |
| Ellubitin | 210 Sandur | Sp/f 2793 |
| ERA | 160 Argir | Sp/f 2246 |
| ES Trans | 100 Tórshavn | P/F 2567 |
| Eymi | 700 Klaksvík | Sp/f 2464 |
| F.R.B. | 100 Tórshavn | Sp/f 2562 |
| Farec | 100 Tórshavn | Sp/f 1935 |
| Fargo | 900 Vágur | Sp/f 2944 |
| Far-Nipp | 360 Sandavágur | Sp/f 2764 |
| Faroe Intertrading | 700 Klaksvík | Sp/f 2461 |
| Fiskasjúkutænastan | 460 Norðskáli | Sp/f 2514 |
| Fløtt | 100 Tórshavn | Sp/f 2968 |
| FN-Contractors | 800 Tvøroyri | Sp/f 2779 |
| Føroya Fiskiídnaður | 100 Tórshavn | P/F 155 |
| Føroyaútgávan Merkið | 100 Tórshavn | Sp/f 2761 |
| Fosco | 380 Sørvágur | Sp/f 1675 |
| Føstuvarði | 370 Miðvágur | P/F 2328 |
| FR - Seafood | 100 Tórshavn | Sp/f 2519 |
| Frá 14.mai 1992 | 100 Tórshavn | Sp/f 2055 |
| frá 4/4-62 | 210 Sandur | Sp/f 2629 |
| Frakt og Sandsølan | 620 Runavík | Sp/f 1305 |
| G.J. | 700 Klaksvík | Sp/f 2430 |
| Gaard Bakarí | 800 Tvøroyri | P/F 1873 |
| GAJ Smíð | 340 Kvívík | Sp/f 2883 |
| Grannskoðan Jóannis | | |
| Skorheim | 700 Klaksvík | Sp/f 2324 |
| Grót- & Entreprenørvirkið | 800 Tvøroyri | Sp/f 2198 |
| Gummibátatænastan | 100 Tórshavn | P/F 1135 |
| Gunnleif´s Bussar | 100 Tórshavn | P/F 2362 |
| Hans Joesne | 470 Eiði | Sp/f 30 |
| Hansen Seafood | 490 Strendur | P/F 2471 |
| Heðin Zachariasen | 435 Streymnes | P/F 1542 |
| Heildarveiting | 188 Hoyvík | Sp/f 2147 |
| Heildarveiting | 188 Hoyvík | Sp/f 2147 |
| Hjá Pidda | 650 Toftir | Sp/f 462 |
| Højgaard Handilsvirki | 620 Runavík | P/F 144 |
| Hornið | 480 Skála | Sp/f 2294 |
| Hydro-Tech | 470 Eiði | P/F 2003 |
| í Djúpagili | 188 Hoyvík | Sp/f 2317 |
| Immanuel | 100 Tórshavn | Sp/f 2996 |
| J.M. Motorar | 370 Miðvágur | Sp/f 2748 |
| Jacob P. Ludvig | 850 Hvalba | Sp/f 998 |
| Jak - Zac | 100 Tórshavn | Sp/f 1953 |
| Jall | 700 Klaksvík | Sp/f 440 |
| JHR - Entrprenør | 600 Saltangará | Sp/f 2769 |
| JKS-Impex | 767 Hattarvík | Sp/f 2354 |
| Jóhan Chr. Dam | 100 Tórshavn | Sp/f 1521 |
| Jørgin Mortensen & Søn | 800 Tvøroyri | P/F 98 |
| Kári Johannesen | | |
| Maskinverkstaður | 530 Fuglafjørður | Sp/f 1277 |
| KG 476 | 700 Klaksvík | Sp/f 1828 |
| KG 699 | 700 Klaksvík | Sp/f 2825 |
| Kiosk Activ | 100 Tórshavn | Sp/f 249 |
| Kjartan Simonsen | 700 Klaksvík | Sp/f 1372 |
| Klaksvíkar Sleipistøð | 700 Klaksvík | P/F 2466 |
| Klettur | 950 Porkeri | P/F 2511 |
| Køksmiðstøðin | 100 Tórshavn | Sp/f 1028 |
| Krabbin | 340 Kvívík | Sp/f 1111 |
| Landshandilin | 100 Tórshavn | P/F 840 |
| Lastbilasmiðjan | 100 Tórshavn | Sp/f 1571 |
| Leif Niclasen | 450 Oyri | P/F 517 |
| Leitel | 100 Tórshavn | Sp/f 2999 |
| Løkin | 620 Runavík | Sp/f 1402 |
| M.C.M. Service | 100 Tórshavn | Sp/f 2221 |
| Mainhard Haldansen | 100 Tórshavn | Sp/f 3042 |
| Matr.nr. 2302 | 100 Tórshavn | Sp/f 2302 |
| Motor- og Køliteknik | 370 Miðvágur | Sp/f 2823 |
| Moyggjartúgva | 900 Vágur | P/F 2293 |
| Múlin | 370 Miðvágur | Sp/f 2334 |
| Myrkjanoyri | 360 Sandavágur | Sp/f 2443 |
| N.J. Mortensen | 800 Tvøroyri | P/F 9 |
| Nakkur | 700 Klaksvík | Sp/f 2715 |
| Navigare | 600 Saltangará | Sp/f 2898 |
| Neystabø | 100 Tórshavn | P/F 1712 |
| Noma-Tek | 100 Tórshavn | P/F 843 |
| Norðbú | 100 Tórshavn | Sp/f 916 |
| Nordic Shipping | 100 Tórshavn | Sp/f 2227 |
| Norna | 100 Tórshavn | Sp/f 2762 |
| North Line | 100 Tórshavn | P/F 1807 |
| Nuna Sten & Grus Føroyar | 530 Fuglafjørður | Sp/f 2651 |
| Offshore Services Ltd. | 100 Tórshavn | P/f 2335 |
| ÓMC | 700 Klaksvík | Sp/f 1716 |
| Onyx | 700 Klaksvík | Sp/f 2768 |
| P.P. | 740 Hvannasund | P/F 2919 |
| Palli á Dul | 160 Argir | Sp/f 2178 |
| Partú | 210 Sandur | Sp/f 2993 |
| Phoenix Reiðaravirki | 800 Tvøroyri | P/F 2248 |
| PoRaZac | 700 Klaksvík | P/F 2453 |
| Poul Åge Joensen | 100 Tórshavn | Sp/f 1408 |
| Rás 2 | 100 Tórshavn | Sp/f 2926 |
| Reinert & Olsen | 100 Tórshavn | Sp/f 936 |
| Repro - Z | 100 Tórshavn | P/F 2932 |
| Rók - El | 656 Saltnes | Sp/f 1869 |
| Roykstovan | 175 Kirkjubø | Sp/f 1964 |
| S.B. Bussar | 100 Tórshavn | Sp/f 2283 |
| S.V. Transport | 530 Fuglafjørður | P/F 1878 |
| Saga-Con | 600 Saltangará | Sp/f 2987 |
| Sancy Seafood | 900 Vágur | P/F 2735 |
| Sandoy Seafood | 240 Skopun | Sp/f 2648 |
| Schlie | 100 Tórshavn | Sp/f 2923 |
| Selnes | 826 Trongisvágur | Sp/f 2863 |
| Seta | 826 Trongisvágur | P/F 2473 |
| Seymiringurin | 600 Saltangará | Sp/f 2953 |
| Siri | 100 Tórshavn | Sp/f 713 |
| Sjónband | 188 Hoyvík | Sp/f 2524 |
| Sjótek | 620 Runavík | Sp/f 1946 |
| Sjóvartún | 690 Oyndarfjørður | Sp/f 681 |
| Skemman | 100 Tórshavn | P/F 1018 |
| Skygni | 510 Gøta | P/F 2365 |
| Smoltaling | 350 Vestmanna | Sp/f 461 |
| Snældan | 490 Strendur | P/F 2463 |
| Snikkaravirkið hjá A.I.K. | 100 Tórshavn | Sp/f 2411 |
| South Island Seafood | 950 Porkeri | Sp/f 2829 |
| Statoil Færøyene AS | | |
| Faroe Branch filialur | 100 Tórshavn | 3092 |
| Statoil Støðin í Leirvík | 520 Leirvík | Sp/f 1898 |
| Stokkastovan | 600 Saltangará | P/F 3007 |
| Strandingur | 490 Strendur | P/F 2337 |
| Suðurleiðin | 950 Porkeri | Sp/f 693 |
| Svøvil | 530 Fuglafjørður | Sp/f 1834 |
| T. & E. Niclasen | 460 Norðskáli | Sp/f 2967 |
| T.J. Textilvirkið | 180 Kaldbak | Sp/f 1038 |
| Tangabúðin | 800 Tvøroyri | Sp/f 1082 |
| Tektrade | 490 Strendur | Sp/f 2000 |
| Tele F | 100 Tórshavn | Sp/f 3076 |
| Traktortænastan | 530 Fuglafjørður | Sp/f 2826 |
| Trio Import | 100 Tórshavn | Sp/f 2162 |
| Trolverkstaðið Bergið | 850 Hvalba | Sp/f 1243 |
| Trongisvágs | | |
| Maskinsnikkaravirki | 826 Trongisvágur | Sp/f 1950 |
| Urðhamar | 700 Klaksvík | Sp/f 2340 |
| Urtagarðurin í Kirkjubø | 175 Kirkjubø | Sp/f 2469 |
| Úrvalsbilar | 160 Argir | Sp/f 2954 |
| Útferðir | 100 Tórshavn | P/F 2339 |
| Vágahavið | 370 Miðvágur | Sp/f 2852 |
| Vágs Timburhandil | 900 Vágur | P/F 336 |
| Vest Service | 370 Miðvágur | Sp/f 2835 |
| Vestmanna Trolarafelag | 100 Tórshavn | Sp/f 276 |
| Vest-Tex | 800 Tvøroyri | Sp/f 1067 |
| Vevstovan Mýrifípan | 100 Tórshavn | Sp/f 2757 |
| Vikarstovan Heilsubót | 100 Tórshavn | Sp/f 2051 |
| VVS-Hornið | 100 Tórshavn | Sp/f 2279 |
| Ýti | 800 Tvøroyri | Sp/f 1102 |

**Skráseting Føroya tann 24. januar 2002**

**Kristin Balle**

# Starvsfólk til Útibarnagarð

Til Útibarnagarðin í Runavíkar kommunu, verður søkt eftir 1 pedagogi og 2 hjálparfólkum at byrja 1. mars 2002 ella eftir nærri avtalu.

Útibarnagarðurin fer at halda til í skúlanum í Lamba, sum verður útbygdur til endamálið, men til útbyggingin í Lamba er liðug, verður hildið til í Missiónshúsinum í Æðuvík.

Á stovninum verða 25 børn í aldrinum 5-7 ár.

**Vit ynskja**
- at tú dámar væl at vera úti í náttúruni
- ert kreativ/ur
- hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan dag saman við børnunum
- ert við til at menna tað pedagogiska arbeiði
- hevur góð samstarvsevnir

Løn smb. sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Skrivlig umsókn, saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum skulu verða kommununi í hendi í seinasta lagi 08.02.2002.



RUNAVÍKAR KOMMUNA.

**Runavíkar Kommuna**
Heiðavegur
600 Saltangará



# Handilsmiðdepilin í Runavíkar Kommunu

## Handilsmiðdepilin í Runavík søkir samskipara

Søkt verður eftir fólki til Handilsmiðdepilin í Runavík. Starvið er eitt hálvdags starv og verður sett skjótast gjørligt.

**Starvið**
Tann, sum settur verður, kemur í høvuðsheitum at marknaðarføra Handilsmiðdepilin, sum er eitt samtak av 33 handlum í kommununi. Arbeiðið er sera sjálvstøðugt, men persónurin kemur tó at hava tætt samstarv við Kunningarstovuni í Saltangará. Arbeiðið fevnir um ymiskar uppgávur so sum:

- Marknaðarføring av Handilsmiðdeplinum
- Leggja ætlanir fyri árið, mánaðir osfr.
- Víðka um Handilsmiðdepilin, fáa fleiri handlar við
- Fyriskipan av tiltøkum og skeiðum
- Samstarv við handlarnar

**Førleikakrøv**
Útbúgving ella royndir innan marknaðarføring og grafiskt arbeiði er ein fyrimunur. Eisini verður dentur lagdur á, at viðkomandi hevur:

- áræði
- góð samstarvsevni
- gott hugflog
- evni til at arbeiða sjálvstøðugt & fleksibult
- EDV kunnleika á brúkarastøði

Løn sambært avtalu.

Fleiri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Eysturoyar Kunningarstovu, tlf. 449449

Skrivlig umsókn við avriti av møguligum prógvum og viðmælum skal sendast til Handilsmiðdepilin innan 20. februar.

**Handilsmiðdepilin**
Boks 200
600 Saltangará
tlf. 449449

Leiðarastarv

# Roknskaparleiðari

Søkt verður eftir leiðara til roknskapardeildina á Strandfaraskipum Landsins.

**Uppgávur hjá roknskapardeildini**
Høvuðsuppgávan hjá roknskapardeildini er at veita eina úrslitagóða búskaparfyrisiting, herundir samskipa, viðlíkahalda og menna búskaparstýringina. Aðrar uppgávur eru:

- Fyriskipan av roknskaparverkinum
- Rakstrar-, íløgu- og likviditetsætlan, herundir langtíðarætlanir
- Roknskaparlig skráseting
- Roknskaparframløga, mánaðar- og ársroknskapir, herundir budgeteftirlit og játtanarroknskapir.

**Uppgávur hjá leiðaranum**
Høvuðsuppgávurnar hjá roknskaparleiðaranum verða:
- Ráðlegging, fyriskipan, raðfesting, samskipan og eftirlit í sambandi við búskaparstýringina
- Seta upp fíggjarætlanina við atliti til:
  - avmarking og útdelegering av avgerðarábyrgd
  - samskifti og samskipan millum stjóra og deildarleiðarar
  - motivatión fyri at røkka tilætlað úrslit
- Framløga av standard- og specialrapportum
- Menna innanhýsis mannagongdir í sambandi við gerð av fíggjarætlan, roknskapi o.ø.
- Fyriskipa upplæring, undirvísing og fakliga menning av starvsfólkunum á deildini
- Uppgávu- og starvslýsingar á deildini.

Í løtuni verður arbeitt við at umleggja búskaparskipanina hjá SL. Henda uppgáva verður ein spennandi avbjóðing fyri komandi roknskaparleiðaran, sum fær ein týðandi leiklut og ábyrgd fyri verkætlanini.

Eisini verður ætlaða byggingin av suðuroyarferjuni ein spennandi avbjóðing fyri roknskaparleiðaran.

**Førleikakrøv**
- Vinnu- og handilsútbúgving frá hægri lærustovni ella líknandi
- Royndir innan edv á høgum brúkarastøði
- Royndir innan fíggjarstýringarskipanir, so sum Navision Financials
- Royndir í projektleiðslu ein fyrimunur
- Málrættaður og arbeiðir analytiskt
- Góð leiðslu- og samstarvsevni
- Góð evni at orða seg bæði skrivliga og munnliga á føroyskum, donskum og enskum.

**Setanartreytir**
Talan er um eitt leiðarastarv við stórum og spennandi avbjóðingum, har leiðarin fær ábyrgdina av at umsita og menna eina týdningarmikla funktión. Starvið gevur góðar møguleikar fyri persónligari og fakligari menning.

Starvið verður sett sambært avtalu, og er lønt í 36. lønarflokki sambært tænastumannalógini, tó uttan at starvið er tænastumannastarv. Eftirlønartrygging fylgir við starvinum.

**Umsóknir**
Umsókn við próvskjølum skal sendast til:

***Strandfaraskip Landsins***
att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

og skal vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 4. februar 2002. Tað er ynskiligt, at tann, sum settur verður, kann byrja skjótast gjørligt.

Um tú ynskir nærri upplýsingar, kanst tú ringja til Reidar Nónfjall, stjóra.

Tlf. 343000 ella e-postur: ren@ssl.fo.

STRANDFARASKIP LANDSINS

*Høvuðsuppgávan hjá SL er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.*

*Árliga rakstrarætlanin hjá SL javnvigar við yvir 150 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 operatørar. Talið á flutningsanleggum er 11 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um alt landið.*


**Alt til seyming á einum stað**

*Útsølan byrjar mándagin 28.01.02*

*Hevur tú hug at seyma sjálv, kannst tú nú gera kvettið. Nógv meturvøra verður seld fyri hálvan prís, og vit hava nógvar bíligar restir*

**Kom inn og ger kvettið**



**SP/F MARJUN HEIMÁ**
C. Ployensgøta 4 • 100 Tórshavn
Tel. 31 25 31 • Fax 31 23 19

**Tilboð**

**Frá Video & Grill 2000**
**Leiga filmar á VHS og DVD**

1 film fyri 35,-
4 filmar fyri 95,-

Leiga barna og teknifilmar í januar fyri bert 20,- stk.

Nógvir at velja ímillum!!!

Tilboð frá Grillini

1 búff Sandwich v/ chips bert 25,-

Annars fæst kyllingur og chips - ymisk sløg av burgarum o.a.

Opið er til kl. 24.00

***Video & Grill 2000***
Per Mohrsvegur 7
188 Hoyvík
Tlf. 322003 · Fax 316290

Í samband við upprudding á goymsluni selja vit hesi H-vindeygu fyri serprísir:



2 stk. 120x160
2 stk. 140x150
1 stk. 60x70 (føst ramma)
1 stk. 110x150
1 stk. 110x120
1 stk. 100x120
1 stk. 120x160 (v/tvørsprossum)
1 stk. 150x210 (rútapartí við loddrøttum sprossum og ráglasi)

Vestmanna Timburhandil
Telefon 472000